UMFATANDI KANNING AVDÚKAR:

# DÝRAST Í




**LIVIKOR** Vit hava havt illgruna um tað leingi. Men nú er tað vísindaliga staðfest: Føroyar er nógv tað dýrasta landið í Evropa at liva í. Men tað er ikki tí, at flutningskostnaðurin til Føroyar er so dýrur ella tí at avgjøldini eru so høg. Høvuðsorsøkin er, at kappingin er so lítil og hetta elvir til óneyðuga høgar prísir

## Keypa lítið sjálvi

Hóast tað er lætt at keypa vørur á internetinum og møguleikarnir eru óendaligir, gera føroyingar lítið av at innflyta vørur sjálvir úr útlandinum fyri at fáa tað bíligari.

Heri á Rógvi sigur, at flutningurin av pakkaposti til Føroya er rættiliga lítil aftur ímóti innflutningi av pakkaposti til okkara grannalond.

Tað tekur hann sum tekin um, at føroyingar ikki vilja, ikki tora ella ikki duga at keypa vørur sjálvir uttanlands umvegis internetið og at fáa tær fluttar heim til Føroya, hóast tað mangan kann vera nógv bíligari.

- Ein orsøk kann eisini vera, at brúkarin í Føroyum er góður við handilin, hann keypir frá og tískil trúgvur ímóti honum.

Men hann heldur avgjørt, at tað er ein vansi, at tað kostar so nógv hjá fólki at keypa lutfalslig smáting til landið.

- Tað gagnar als ikki samfelagnum, at tað skal kosta fólki 200 krónur at keypa okkurt fyri 500 krónur uttanlands, nevnir hann sum dømi.

Áki Bertholdsen

Føroyingar eiga í hvussu so er eitt evropamet. Og tað er í høgum prísum!

Tað er niðurstøðan av eini umfatandi kanning, sum Heri á Rógvi, búskaparfrøðingur, hevur gjørt hetta síðsta hálvtannað árið við stuðuli frá Kappingarráðnum, Samtaki, universitetinum í Århus, Uttanríkisráðnum og Landsbankanum.

- Úrslitið av kanningini er, at sum heild er keypiorkan hjá føroyingum heili 14% lægri enn keypiorkan í Danmark.

Tað er áður staðfest, at Danmark er dýrasta land í Evropa at liva í. Men nú er tað so prógvað, at tað er uppaftur nógv dýrari at búgva í Føroyum.

Í kanningini, sum akkurát er liðug, hevur búskaparfrøðingurin samanborið keypiorkuna hjá føroyingum og danskarum fyri soleiðis at kunna samanbera livikorini í báðum londunum.

Hetta er fyrstu ferð, at ein slík kanning er gjørd. Og úrslitið er órógvandi, tí nú er tað staðfest, sum vit øll hava havt illgruna um leingi.

Tað eru bæði vørur og tænastur, sum eru nógv dýrari í Føroyum enn í Danmark.

### Ov lítil kapping

Heri á Rógvi staðfestir eisini, at tað er ikki hvørki flutningur ella avgjøld sum gera, at tað er so nógv dýrari at keypa vørur og tænastur í Føroyum, enn í Danmark.

Heri á Rógvi sigur: Avgjøldini eru at kalla tey somu, burtur sæð frá, at vit hava verjutoll á nøkrum heilt einstøkum vørum.

Og flutningsútreiðslurnar eru bara orsøk til eini 5% av prísmuninum.

– Høvuðsorsøkin til, at tað er so nógv dýrari í Føroyum, er, at vit hava so lítla kapping á nógvum avgerðandi økjum.

– Nógv viðurskifti í Føroyum er merkt av, at vit hava ein, tveir, ella nakrar heilt fáar veitarar á økinum. Hetta er eisini galdandi fyri viðurskifti, sum hava stóran týdning fyri brúkaran.

– Tað førir við sær, at kappingin verður ov lítil og tað førir so aftur til hægri prísir enn neyðugt.

Hann vil ikki við hesum siga, at føroyskir handlar og fyritøkur misbrúka sína marknaðarstøðu til at smyrja tjúkt upp á prísirnar.

– Men tað er ein sannroynd, at monopol og duopol føra til einsháttað útboð av vørum og tænastum og einsháttaðar prísir. Og tað eru nógv tekin um, at hetta er støðan í Føroyum, sigur Heri á Rógvi.

- Marknaðarstøðan, sum er í Føroyum, elvir til, at prísirnir verða hægri enn teir høvdu verið undir vanligum kappingarumstøðum og tí er tað stak óheppið, at kappingin er so avmarkað.

### Víðari kanningar

Heri á Rógvi sigur, at ein kanning sum hendan eigur fyrst og fremst at verða brúkt sum grundarlag undir einum kjaki um nýtslu, prís